# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

Mercedes-Benz C:

# Ein klassi fyri C






*Nýggi Mercedes-Benz C sum kemur á marknaðin í vár. Her í Avantgarde útgávuni*

**Nýggjur og størri Mercedes-Benz C kemur á marknaðin í vár. Hesin fer í beinleiðis kapping við týsku kappingarneytarnar og vendir sær serliga til teir ungu kundarnar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Størri trygd, betri komfort og betri koyrieginleikar, men sami prísklassi, vóru nøkur av lyklaorðunum tá ”spakin varð settur í “ til nýggja Mercedes-Benz C.

Sum altíð tá ein nýggjur Mercedes-Benz kemur á marknaðin, setur hesin eisini nýggjan standard í sínum klassa, serliga innan trygd og komfort.

Nýggi Mercedes-Benz C er bæði longri (+55 mm) og breiðari (+45 mm) enn forgangarin. Hetta gevur munandi betri pláss í kabinuni nog viðførisrúmið er eisini vaksið við 20 litrum til 475 liter. Aksilfrástøðan er eisini størri.

C-klassin fæst framvegis við fleiri ymiskum 4-cyl. bensin og dieselmotorum umframt teir væl umtóktu V6-motorarnar. Fleiri av hesum motorum eru nú kvikari, meira orkusparandi og umhvørvisvinarligari enn áður.

C-klassin fæst eisini, sum tann einasti í sínum klassa, við serliga trygdarsysteminum hjá Mercedes ”PRE-SAFE”. Av framkomnari útgerð kunnu vit t.d nevna ”Intelligent Light System”, bi-xenon forlyktum, sum kunnu stillast alt eftir veðri og koyriumstøðum. Í mun til forgangarin er stýringin nú meira neyv og girskiftið lættari.

C-klassin hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir sum t.d. aktivar nakkastúttur, window-airbag til allar síðurútarnar og knæ-airbag við førarasetrið.

Hesin er triðja generatión av C-klassanum, ið fyrstu ferð kom á marknaðin í 1993, sum avloysari fyri Mercedes-Benz 190, sum tá hevði verið á marknaðinum síðan 1982.

C-klassin verður gjørdur í útgávunum: Classic, Avantgarde (Sport) og Elegance. Sum nakað nýtt síggja Avantgarde og Elegance ikki eins út framman. Avantgarde sær meira sportligur út við stórari Mercedes-stjørnu í kølaragittarinum og ikki oman á motorhjálminum sum hinar útgávurnar.

Nýggi Mercedes-Benz C kemur á marknaðin í vár. Næsta ár kemur AMG V8 útgávan og á altjóða bilaframsýningini í Frankfurt í september verður stationcar útgávan sýnd fram.



*Sum nakað nýtt síggja Avantgarde og Elegance ikki eins út framman. Avantgarde sær meira sportligur út við stórari Mercedes-stjørnu í kølaragittarinum*




*Nýggi Mercedes-Benz C er bæði longri og breiðari enn forgangarin*